# Hvat skal gerast við 10. flokk?

**Skal 10. flokkur vera eitt avslappingarár, skal hann fyrireika næmingar uppá miðnámsskúlan, skal hann vera eitt tilboð til teirra, ið veruliga ynskja at bøta um karakterirnar ella skal hann rætt og slætt avtakast? Millum aðrar vóru hesir spurningar havdir á loftið í læraraskúlahøllini mikukvøldið, tá skúlastýrini í Havn bjóðaðu inn til alment kjak um evnið.**

10. FLOKKUR
*Eydna Skaale*
*Eydna Skaale@sosialurin.fo*



*Tríggir 10. floks næmingar, sum høvdu gjørt eina spurnarkanning um 10. flokk. Tær sótu eisini við pallborðið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Lagt var upp til ein spennandi fund, har næmingarnir skuldu vera í fokus og siga sína hugsan um málið. Huglagið var avslappað, borð við fruktum stóðu í miðjuni av salinum og Jógvan Arge, sum var orðstýrari, dugdi væl at halda róliga tónan.

Uppmøtingin til fundin var tó ikki so góð sum væntað. Læraraskúlahøllin var ikki fullsett, og flestu av fundarfólkunum vóru lærarar. Fá foreldur og færri 10. floks næmingar vóru at síggja. Spell, tá fundurin í grundini snúði seg um tey.

Tað merkti eisini ætlaða kjakið, at uppmøtingin ikki var so góð, tí tað spurdist tíanverri ongantíð veruligt kjak burturúr.

## Fyrstu framløgurnar

Fyrsta innleggið høvdu tríggjar gentur, sum ganga á miðlabreyt í 10. flokki. Tær høvdu gjørt eina áhugaverda spurnarkanning millum 10. floks næmingar í Havnini.

Kanningin vísti m.a. at ein triðingur av næmingunum angra, at tey fóru í 10. flokk.

At uml. helvtin av næmingunum ikki heldur, at frálæran er áhugaverd.

At helvtin av næmingunum kundu hugsað sær at skift til eina aðra breyt, enn hana teir hava valt.

At ein triðingur av næmingunum ikki siga seg møta væl upp og at teir flestu næmingarnir siga, at kunningin, sum teir fingu um 10. flokk áðrenn teir valdu at ganga síðsta árið eisini, ikki var nóg góð.

Ein næmingur úr Eysturskúlanum greiddi frá um skipanina har. Har verður hvør einstakur tími býttur upp eftir førleika. Hon segði, at tað hevði eydnast sera væl í fjør, men at tað í ár vóru alt ov nógv, sum ikki tímdu at ganga í skúla longur, og tískil bert forstýraðu hini. Hon helt annars, at 10. avgjørt ikki skuldi takast av, tí tað er eitt gott ár at mennast í, áðrenn farið verður víðari.

Men ikki øll vóru samd við hana. Ein næmingur, sum hevur gingið í Venjingarskúlan, segði, at 10. flokkur var eitt fullkomiliga burturspilt ár. Einki kom burturúr. Hon segði, at tá skiftið til miðnámsskúlan kom, vóru bæði arbeiðslag og vani at gera skúlating horvin, orsakað av 10. flokki. Hon helt, at ístaðin fyri at vera eitt avslappingarár, átti 10. flokkur at verið eitt fyrireikingarár til miðnámsskúlan.

## 10. floks lærarin

Torfinn Højgaard, ið er lærari hjá 10. flokki heldur, at 10. árið er gott at hava hjá næmingunum at mennast í. Eitt ár, har teir hava møguleika at læra at grundgeva fyri sínum sjónarmiðum, at kjakast, at leggja ætlanir og fylgja teimum, at hugsa kritiskt og at læra at umstilla seg. Hevði 10. árið verið nýtt til hetta, høvdu næmingarnir verið meiri avkláraðir, tá teir vóru lidnir við fólkaskúlan.

Torfinn heldur, at núverandi skipan hevur nógvar vansar. T.d. eru næm-ingarnir byrjaðir at arbeiða og tjena sær pening, og hetta gongur ofta útyvir skúlagongdina. Teir koma døllandi kl 12.30 og eru nývaknaðir.

Torfinn sigur víðari, at tað, sum næmingarnir verða spurdir eftir, tá teir koma út úr skúlanum, er hvørt teir duga at lesa, skriva og rokna og um teir eru kønir innan KT. Eingin arbeiðsgevari er áhugaður í, at næmingurin hevur havt 480 tímar av t.d. ítróttabreyt. Tað løgna er bara, at breytin er kravd, meðan hinar lærugreinarnar ikki eru tað. Breytirnar eru góðar, tí tær loyva næminginum at velja eftir áhuga og evnum, men tær taka kanska í so nógv av skúlatíðini, segði Torfinn.

Tvær mammur løgdu eisini fram sínar hugsanir um síðsta skúlaárið. Onnur hevði sera góðar royndir av 10. flokki, meðan hin hevði út av lagið vánaligar royndir.



*Tíverri var salurin ikki meira enn hálvsettur til hetta áhugaverda evni*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Orðið var frítt

Tá orðið bleiv frítt, vóru tað bert fá, ið nýttu møguleikan at siga sína hugsan. Í flestu førum vóru tað lærarar, sum søgdu nøkur orð.

Ein lærari spurdi, um tað kundi hugsast at hava ávirkan á næmingarnar, at studningur ikki fæst fyrr enn tú ert vorðin 18 ár. Um ikki tað hevði fingið fleiri næmingar at farið beinleiðis á miðnámsskúla, um aldursmarkið til studningin bleiv lækkað ella tikið burtur.

Ein annar lærari segði seg hava stórar trupulleikar av 10. floks næmingum, sum ikki tíma at vera har. Hon segði tað vera ógvuliga torført at skula fyrireika næmingarnar uppá lívið á miðnámsskúla ella vinnulívið, tá ongar heimildir eru at seta mørk.

Hon samanbar 10. flokk við miðnámsskúlar og vinnulívið, har tú rýkur út um tú ikki møtir upp hvønn dag, ert til tíðina og ger tað, sum kravt verður av tær. Í fólkaskúlanum hevur lærarin bert heimild at práta við næmingin og foreldrini. Teir kunnu týggja sær sum teir vilja, uttan at tað fær nakrar avleiðingar. Og tað gongur so sjálvsagt útyvir teir næmingarnar, ið veruliga tíma at ganga í skúla og sum taka 10. árið í álvara.

Eingin segði nakrantíð ímóti nakrari viðmerking, og tískil varð sum so einki kjak. Hetta var sera harmiligt, tí evnið er jú upplagt til kjak og meiningarnar eru nógvar.





*Niels Nattestad, sum her hevur orðið við pallborðið, segði seg vera skelkaðan av ætlanunum um at avtaka 10. flokk*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Niels Nattestad, skúlastjóri á venjingarskúlanum:

# Tú lærir ikki fyrr enn tú ert búgvin til tess

**Niels Nattestad fanst at okkara hugsunarhátti, har alt altíð skal snúgva seg um pengar. – Tað er sjálvandi nógv bíligari at avtaka 10. flokk og stovna ein forskúla í staðin. So verður framvegis 10 ára skúlagongd, men fyri nógv minni pening. Men tú lærir ikki fyrr enn tú ert búgvin til tess, og fleiri eru, sum ikki eru búgvin at fara víðari eftir lokna 9. floks skúlagongd. Til teirra er 10. árið ætlað**

10. FLOKKUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin. fo*

Niels Nattestad segði víðari, at hann skilti, at tað var ein torfør politisk ábyrgd at skula fáa endarnar at røkka saman, men at tað ikki var nøkur loysn at avtaka 10. flokkin.

– Sjálvandi eru nógvir pengar at spara, um vit avtaka 10. og stovna ein kravdan forskúla ístaðin. Næmingarnir verða so lidnir við útbúgvingina eitt ár áðrenn teir verða í dag. Fólk kunnu sostatt byrja at arbeiða og tjena pengar til samfelagið sum 25 ára gomul, ístaðin fyri sum 26 ára gomul. Á hendan hátt sparir samfelagið eina rúgvu av pengum. Men tað eru bara so nógvir næmingar, sum ikki eru førir fyri at fara beinleiðis víðari eftir 9. flokk. Teir eru hvørki fakliga ella menniskjansliga nóg búnir.

Niels Nattestad segði seg vera blivnan sera kløkkan, tá hann frætti, at mentamálaráðið hevur tosað um at avtaka 10. flokk.

– 10. flokkur leggur upp til, at næmingarnir skulu bøta um karakterirnar. Tískil hava vit fingið breytirnar, har næmingarnir kunnu arbeiða nógv við evnum, sum teir sjálvir ynskja. Vit hava 11 breytir at velja ímillum, so har skuldi verið okkurt fyri øll, segði hann.

Niels segði eisini, at ein vansi við skipanini er, at tað av og á koma hol í skemað, og at næmingarnir hava ilt við at møta til tímarnar eftir at hava havt ein frítíma ella tveir. Tískil kundi man skipað allar 10. flokkarnar á einum og sama stað, har nakrir lærarar fingu ta uppgávu at taka sær av 10. burturav. Hetta hevði eisini gjørt lærarauppgávuna munandi léttari, tí ofta er trupult hjá lærarunum at umstilla seg frá t.d. 1. til 10. floks undirvísing.

Niels Nattestad heldur, at flestu næmingar eru vælnøgdir við breytaskipanina, men at okkurt smávegis átti at verið bøtt. Sum skilst, so hevur talan verið um at gera ein bólk, sum kann koma við hugskotum til, hvussu 10. flokkur kann skipast øðrvísi.

Skúlastjórin endaði við at heita á mentamálaráðið, um ikki at kappa høvdið av hesum týdningarmikla parti av fólkaskúlanum.

# Ætlanin við 10. flokki er at bøta um miðaltalið

**Hetta segði Oláus Jespersen, sum er deildarleiðari í mentamálaráðnum. Hann segði, at 10. flokkur skal vera eitt tilboð til teirra, ið veruliga ynskja betur førleika áðrenn farið verður víðari. Restin av næmingunum skulu gevast eftir 9. flokk**

10. FLOKKUR
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin. fo*

– 10. skal ikki vera tikin, tí næmingarnir ynskja at slappa av í eitt ár. Tað undirstrikaði Oláus Jespersen á fundinum mikukvøldið. Hann segði, at um næmingarnir eru fakliga førir fyri tí, t.v.s. um teir hava góðkenda miðaltalið, so skulu teir fara víðari beinanvegin eftir 9. flokk. Oláus vísti eisini á, at lærarar á miðnámsskúlunum hava eitt tógvið stríð at bróta niður vánaligu arbeiðsvanarnar, sum næmingarnir fáa í 10. flokki.

– Næmingarnir mugu umformast, tí teir eru oyðilagdir. Teir flestu næmingar fáa eisini sjokk, tá teir koma á miðnámsskúla, tí teir eru ikki vanir at ganga í skúla og gera heimaarbeiði. Arbeiðslagið er farið, sigur Oláus. Hann heldur, at betri kunning átti at verið í fólkaskúlanum um arbeiðslagið í miðnámsskúlanum.

Hann vísti á, at í øllum norðanlondum eru tað bert í Danmark og Føroyum, at 10. flokkur er til. Hini londini byrja skúlagongdina, tá børnini eru 6 ára gomul, og tey flestu halda fram á skúlabonki inntil útbúgvingin er komin undir land. Tey koma á hendan hátt ongantíð úr arbeiðslagnum og hava hóskandi avbjóðingar allatíðina.

Her á landi eru mong, ið stinga í sekkin eftir 9. flokk, og fara uttanlands í eitt ár at leita sær eftir avbjóðingum, tí 10. flokkur her heima hvørki gevur avbjóðingar ella motivitatión.

Oláus vísti á, at tølini frá útbúgvingarálitinum frá 1999 siga, at uml 2/3 av næmingunum skuldu farið beinleiðis víðari, meðan 1/3 skuldi verið eftir í 10. og nomið sær meiri kunnleika. Men veruleikin er beint øvugtur. 2/3 vera verandi og 1/3 fer víðari. Hesi tølini hanga kanska saman við vantandi avbjóðingunum í 10. Tey flestu hava heilt einfalt einki at gera har.

– Tað er upp til teir einstøku skúlarnar at gera tímatalvuna spennandi. Eingi krøv eru um tað námsfrøðiliga, og tískil kunnu skúlarnir sjálvir gera undirvísingina meiri áhugaverda, segði Oláus Jespersen.



*10. flokkur skal ikki nýtast til eitt avslappingarár, staðfestir Oláus Jespersen, deildarleiðari í Mentamálaráðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*